# Valkvøldið í myndum




*Lisbeth Petersen kann alt annað enn fegnast um úrslitið hjá Sambandsflokkinum. Bæði flokkurin og hon persónliga gingu aftur á valinum*



*Høgni Hoydal fær júst at vita úrslitið í Suðurstreymi. Tjóðveldisflokkurin varðveitir sínar tríggjar tinglimir og er størsti flokkur í Føroyum. Sjúrður Skaale, Annita á Fríðriksmørk og Kristina Háfoss fegnast um góða úrslitið*

**Nógvir vinnarar og taparar vóru staddir í Norðurlandahúsinum valkvøldið. Ikki ber altíð til at seta orð á kenslur so sum sorg, gleði, vónbrot og ovfarakæti, so vit lata myndirnar tala fyri seg**

*Myndir: Jens Kr. Vang*



*Jenis av Rana hevur allar orsøkir at fegnast. Miðflokkurin tvífaldaði sína luttøku á Føroya Løgtingi*



*Melvis Stardust og Esmar Eysturoy, eisini kendir sum Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale høvdu eisini leitað sær niðan í Norðurlandahúsið*



*Hin stuttligi flokkurin var væl umboðaður í Norðurlandahúsinum. Her síggjast tvey við borðið hjá Hinum stuttliga flokkinum, sum spent fylgja við í útvarpinum, hvussu tað gongur flokkinum kring landið*


## Bilur til sølu

Silvurgráur, vælhildin (bensinbilur)

Peugeot 206 við 2 hurðum, til sølu.

Skrásettur fyrstu ferð 15.02.2002 og hevur koyrt 51.000 km.

4 píkadekk fylgja við í keypinum.

Áhugað kunnu ringja:



**P/F Føroya Shell**
Tel: 347400 - lokal 414




*Valevnið hjá Javnaðarflokkinum í Norðstreymi, Hans Pauli Strøm, sær rættiliga hugsunnarsamur út um støðuna*



*Heðin Mortensen ásannar, at hann fall í Suðurstreymi. Eygnabráið er einki at taka feil av*